**Samandráttur av fundarsamtykt hjá Hvalbiar Kommunu tann 17. febr. 2012**

Møtt: Otto West, Niels Olaf Eyvindsson, Trygvi Midjord, Martin í Nesi,
Herdis Jensen, Rúni Thomsen og Niels J. Thomsen.

| | |
|---|---|
| **Mál 1:**<br>**Umsókn um stuðul til ferð frá Livar Nysted.** | Til 1:<br>Samtykt varð ikki at stuðla tiltakinum. |
| **Mál 2:**<br>**Umsókn um stuðul til ráðstevnu hjá Svimjisambandi Føroya.** | Til 2:<br>Samtykt varð ikki at stuðla hesum. |
| **Mál 3:**<br>**Umsókn um stuðul til Suðuroyar Ítróttardepil.** | Til 3:<br>Samtykt varð at boða frá, at Hvalbiar Kommuna ynskir ikki at vera við í sjálvsognarstovninum, men møguliga stuðla við einum ávísum krónutali, tá arbeiðið er komið longri ávegis. |
| **Mál 4:**<br>**Umsókn um stuðul t. blaðið "Eftirskúlin nr.7".** | Til 4:<br>Samtykt varð at stuðla blaðnum við kr. 5.000,-. |
| **Mál 5:**<br>**Byggisamtyktin.** | Til 5:<br>Samtykt varð at leggja byggisamtyktina við kortum fyri Hvalbiar sóknar Kommunu fram frá mánadegnum 20. februar 2012. |
| **Mál 6:**<br>**Skriv frá borgara um vegrennu.** | Til 6:<br>Samtykt varð, at Vega- og havnanevndin kannar málið. |
| **Mál 7:**<br>**Bøgarður í Giljum.** | Til 7:<br>Búnaðarstovan vísir til lóg nr. 171 frá 18. mai 1937, § 18. Samtykt varð at fáa greitt at vita, hvør eigur hegnskylduna. |

| | |
|---|---|
| **Mál 8:**<br>**Skriv frá borgara - breiðkan av Nesvegi í 2007.** | Til 8:<br>Samtykt varð, at Vega- og havnanevndin fer<br>á staðið og kannar, hvat gerast kann. |
| **Mál 9:**<br>**Skriv frá borgara - bátahylur í Nesi / Sandáin.** | Til 9:<br>Samtykt varð at vísa til skriv frá Yvirfriðingar-<br>nevndini hesum viðvíkjandi. |
| **Mál 10:**<br>**Tilboð uppá spreinging í Grótbrotinum.** | Til 10:<br>Samtykt varð at taka av tilboðnum frá P/F<br>Articon. Tilboð var eisini frá P/F J & K Petersen |